















# Sethús
# í eysturbýnum í Tórshavn

Sethús frá 1968, sum eru í tveimum hæddum, umframt eitt loft, sum er partvís innrættað.

Í miðhæddini, sum er 84 fermetrar, er ein gongd, eitt baðirúm, ein køkur, ein stova, trý kømur og ein hjallur. Baðirúmið er gjørt av nýggjum. Takið og ein partur av vindeygunum eru skift. Køkurin er ikki stórur, men tó hugnaligur og arbeiðsligur. Útfrá køkini er útgongd til eina altan og víðari út í hjallin. Úti á altanini hevur tú møguleika at hava møblar standandi og njóta tær góðu løturnar við sera góðum útsýni yvir Nólsoynna og fjørðin.

Á loftinum er eitt stórt innrættað rúm við tilhoyrandi vesi og eitt goymslurúm. Loftsrúmið er vælegnað sum spælirúm til børn, ella til tannáringar, sum hava brúk fyri egnum høli.

Kjallarin hevur áður verið innrættaður sum íbúð og er partvís undir umvæling. Sostatt hevur tú góðar møguleikar, at gera íbúð í kjallaranum við egnari inngongd.

Húsini standa væl fyri í eysturbýnum. Skúlin liggur beint við síðuna av húsunum. Tá tú koyrir inn á gøtuna, merkir tú beinanvegin, at her er eitt gott umhvørvi við góðum grannalagi - og hóast stutt er til miðbýin, handlar og barnagarð, virkar alt so friðsælt.

Tú fært meira at vita um húsini við at ringja til Skyn á tlf. 35 74 00.

**Fakta um húsini**

| | |
|---|---|
| Adr.: | við Gálgastein 7, Tórshavn |
| Byggiár: | 1968 |
| Hæddir: | 2 |
| Stødd innan: | 168 fermetrar |
| Grundøkið: | 514 fermetrar |
| Prísuppskot: | kr. 2.500.000 |

skyn

**Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo**